## Heyststevna á Soli Deo Gloria í Klaksvík
## Í døgunum 13.- 17. oktober 2004



Vit bjóða tær vælkomnan til heyststevnu, har vit savnast um Guds orð, og nógvan sang og lovprísan.

Kom og kenn at Harrin er góður, kann kann loysa teg úr bondum sum tú kennir teg fjøtraðan í.

Kom og verð uppbygdur í einum kristnum felagsskapi, har vit biðja við hvørjum øðrum, uppbyggja hvønn annan á andaligan hátt.

***Skrá:***

**Mikukvøldið 13. oktober 2004**
Kl. 20.00 Møti

**Hóskvøldið 14. oktober 2004**
Kl. 20.00 Møti

**Fríggjakvøldið 15. oktober 2004**
Kl. 20.00 Møti

**Leygardag 16. oktober 2004**
Kl. 10.00 Sangur og lovprísan
Kl. 15.00 Møti
Kl. 20.00 Møti
Kl. 23.00 Undgómur møtir ungdómi (ungdómskvøld)

**Sunnudagur 17. oktober 2004**
Kl. 10.00 Sangur og lovprísan
Kl. 14.00 Sunnudagsskúli
Kl. 15.30 Møti
Kl. 18.00 Møti

Luttøka verður ymstastaðni úr landinum, við talu, sangi og vitnisburði. Tú ert hjartaliga vælkomin til klaksvíkar hesar dagar.

Hebr. 13.8 Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir.

**Leiðslan fyri Soli Deo Gloria**



**TOYOTA COROLLA**
*T-sport 192 HK*



ÁRG. JULI 2002 · KM 31.000 · 6 GEAR
TIL SØLU FYRI **190.000 KR**
Bíligari bilur kann ganga inn í býti
**TEL 514716**



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



# HVØR VERÐUR ÁRSINS...





## FÓTBÓLTS-GALLAVEITSLA 2004

Fótbóltsgallaveitslan 2004 verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 16 oktobur kl. 19.30

Til borðhaldi verður undirhald og felagssangur og gestarøðari.
Heri Jacobsen úr barometrinum verður konferencier.
Til matna verður smyrjibreyð og okkurt omaná

Meðan dansur er hava galla-luttakararnir atgongd til lukka hølið

Kostnaðurin fyri tiltakið er 250 kr. fyri hvønn. Íroknað prísin er vælkomstdrykkur, matur, 2 øl/sodavatn og dansur.

Tilmelding á teldupost galla@gigotu.fo ella við sms á tel. 585051 / 223667

## FÓTBÓLTSDANSUR



SHOWMENN · Í MENTANARHÚSINUM Í FUGLAFIRÐI
LEYGARKVØLDIÐ 16 OKT · FRÁ KL 00.00-04.00
KOSTNAÐUR KR 130

Bussar í samband við dansin, bileggið pláss:

| | |
|---|---|
| Havn 22:30 | tlf 223311 |
| Toftir 23:30 | tlf 505220 |
| Sundalagið 23:00 | tlf 505520 |
| Eiði 23:00 | tlf 505520 |

Sosialurin

GÍ








# PAM Offshore Service
## søkir elektrikarar til arbeiði í Noregi

Av tí at eftirspurningurin eftir dugnaligum elektrikarum til arbeiði í Noregi økist, hava vit brúk fyri fleiri fólki.

Talan er um útbygging av gass-verkætlanini »Snøhvit« ið Statoil letur byggja á oynni Melkøya, uttanfyri Hammerfest í Norðurnoregi. Arbeitt verður tvær vikur og frítíðin er tríggjar vikur.

Um tú lýkur niðanfyri nevndu krøv, vilja vit fegin hoyra frá tær:

- Tú er elektrikari, helst við royndum frá oljuvinnu ella skipi
- Dugur at samskifta á norðurlendskum
- Ert álítandi, ágrýtin og samvitskufullur

Ringið og hoyrið nærri hjá

**P/f PAM Offshore Service**
Gunvør Balle, tlf. 30 11 00

*P/f PAM Offshore Service er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju og veitir tænastur til oljuvinnuna. Í løtuni starvast um 20 fólk uttanlands í hesu vinnu.*



Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Kommunulæknin í Kollafirði**

Eg eri fyribils fluttur í onnur høli í Kollafirði (gamli skúli)
Gevið gætur - telefon og faxnummarið er broytt:
Telefon: 30 24 20
Telefax: 30 24 21
Fartelefon: 21 14 30
Telefonviðtala við lækna kl. 8.00 til 9.00
Telefonviðtala við skrivara kl. 9.00 til 11.00
Sten Larsen

SNARSKIVAN
www.torshavn.fo



# Pedagogar
### til Bústovnin og Sambýlið á Mýruvegi í Klaksvík.

Innan Almanna- og heilsumálaráðið og stovnum undir tí, við tænastu inntil víðari á Bústovninum og Sambýlinum á Mýrivegi er eitt pedagogstarv leyst at søkja á Bústovninum og eitt á Sambýlinum. Bæði størvini eru frá 15.11.04 ella eftir nærri avtalu.

Størvini verða sett sum tænastumannastørv, lønt lønarstigini 24 - 33 eftir lønartalvuni frá oktobur 2004. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna við skiftandi arbeiðstíðum og arbeiði annahvørt vikuskifti.

Á Bústovninum búgva 4 ung fólk við sjúkrageiningi autismu. Á Sambýlinum búgva 6 vaksin menningartarnaði. Endamálið við okkara arbeiði er, at skapa tryggar karmar hjá búfólkunum og seta skipa fyri virksemi, sum er til gagns fyri hvønn einstakan.

Vit bjóða eitt spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum bæði persónliga og fakliga.

Umráðandi er at umsøkjarnir eru væl fyri kropsliga og eru áhugaðir í at verða nógv úti í náttúruni, svimja o.a. Somuleiðis hevur tað týdning at umsøkjarnir hava góð samstarvs- og innlivingarevnir.

Bert fólk sum hava lokið námsfrøðiligt prógv, kunnu setast í pedagogstørvini, men um ikki útbúgvið fólk verður sett, verða fólk við øðrum førleika sett í starv í avmarkað tíðarskeið.

Nærri fæst at vita um størvini frá leiðarnum á telefon 456310. Umsóknarfreistin er 1. november 2004 og skulu umsóknirnar, saman við prógvum, viðmælum v.m. sendast til

**Bústovnin á Mýruvegi**
Att. Leiðarin
Mýrivegur 13A
700 Klaksvík



# Frá Vestmanna Skúla

Søkt verður eftir lærara til Vestmanna Skúla í tíðarskeiðnum 1. nov. 2004 til 28. juni 2005. Tímatalið verður umleið 22 um vikuna, og lærugreinarnar, undirvíst verður í, eru enskt og smíð. Harumframt verða nakrir tímar sum stuðulslærari.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 470100 ella 444386, ella formannin í skúlastýrinum, Jógvan í Dávastovu, tlf. 424566.

Umsóknir til starvið skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. oktober.



**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til goymsluna

Til goymsluna á Landssjúkrahúsinum er eitt fulltíðar starv sum sjúkrarøktarfrøðingar leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Goymslan hevur umleið 7.000 ymiskar vørur, og umsitur umleið 13. milliónir kr. árliga. Vit veita vørur til Landssjúkrahúsið, Suðuroyar sjúkrahús, Klaksvíkar sjúkrahús umframt onnur viðskiftarfólk innan heilsuverkið.

Goymslan umsitur eisini útlán av hjálpartólum, sum verða lænt sjúklingum heim styttri tíðarskeið.

Umframt tað vanliga arbeiði á goymsluni kemur viðkomandi at umsita hesi útlán.

Tað starvast í løtuni 6 starvsfólk á goymsluni.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur.
- faklig vitan innan tól og vørur, sum dagliga verða nýtt í røktini á sjúkrahúsum
- edv-kunnleiki á brúkarastøði (Navision Financials forrrit verður brúkt)
- kunnleiki til goymslur og vørustýring er ein fyrimunur.

**Eginleikar:**
- góður røkjuskapur
- góð samstarvsevni og tænastuninni
- at verða opin og positiv/ur, eisini tá nógv er at gera.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Malenu Meitelberg, leiðara á goymsluni.
Telefon 30 45 99 - 1163 ella e-post
malenam@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 26. oktober 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*



Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!